# Fløkja í tekstarøðini hjá Bjartalíð ella Úf?

## - spurningur til leiðsluna í kringvarpinum

TÓRBJØRN JACOBSEN



Tað hevur verið hugaligt í fleiri ár at hoyrt glyvraprest, Meinhard Bjartalíð, leygarkvøldini fyri heilaga dagin tulkað sunnudagstekstin í sendingini "Hetta heilaga evangeliið skrivar". Maðurin er evnagóður á so mongum økjum, serliga í tónleikinum, og tí fær hann hesa sera stuttu sendingina at hanga so merkiliga væl saman. Mong lurta eftir henni, - sjálvt um hon ikki verður send í prime-time.

Leygarkvøldið farna var eitt undantak. Huglagið var hitt sama, fyrireikingin framúr sum altíð og tónleikurin á sera høgum støði, men sum fráleið var tað greitt, at Bjartalíð var vilstur í kirkjuliga kalendaranum. Var vorðin í so skundigur, táið hann tríggjar dagar fyri veturnætur var komin longri ávegis enn tey flestu, nú hann viðgjørdi dagin í dag sum alla halganna sunnudag. Theodor Olsen fekk kortini alt í rættlag aftur, táið hann í útvarpaðari guðstænastu úr Kvívíkar kirkju fekk hálað okkum aftur á beint.

Kom eftir sendingina í prát við ein samkomumann hjá brøðrunum, sum eisini hevði sitið við lurtið, og hann var líka so ørkemlaður sum eg. Setti meg síðan í samband við prestin á Glyvrum, fyri at vita hvussu stjølurin var, ella um einhvør óargalig kisa hevði knýtt seg í heysinum á honum, sum kundi hava verið orsøkin til, at hann so knappliga hevði mist dagaskilið. Vælvitandi, at mong nú sótu kring landið, og ivaðust í hansara førleika sum hirða í fólksins kirkju.

Rættiligur ágangur hevði verið á máltráð hansara, og hann hevði av lívsins kreftum roynt at komið sær í samband við Kringvarpið, fyri at fáa teir at saðla um, segði hann í telefonini úr brekkuni undir Stórafjalli. Men til fánýtis. Annars hevði hann í vikuni verið í Havn og lisið fýra komandi sendingar inn á stálband, og eftir øllum at døma var fløkja komin í røðina hjá tøkningunum, sum avgreiða útvarpingina. Teir byrjaðu við tí sum skuldi sendast í hinum endanum. Harvið hevur almenna public-service rásin nú eina øvuta tekstarøð.

Hetta kann bara vera úrslitið av dølskni og líkasælu, og eigur undir ongum umstøðum at koma fyri. Kristna læran er alt annað enn ein mýruvongur í andaliga førningi føroyinga, tí eigur slík vanvirðing ikki at henda, líkamikið hvør orsøkin annars skuldi verið. Einasti legitimitetur undir kringvarpsgjaldinum er public-service hugtakið. Samfelagsskyldan sum mentanarstovnurin hevur at røkja týðandi mál tjóðarinnar vegna. Megnar stovnurin ikki tað, og er hann samstundis í ferð við at flyta seg yvir í ein ísakaldan og kyniskt rationellan management stovn, har cost benefit, búskaparligar og ikki tær mentanarligu lógirnar ráða, so er av álvara vandi á ferð.

Tey, sum vóru farin at ivast í, um glyvraprestur ella útvarpið vóru farin at ganga í ørviti ella komin í barndømi, mega kunna krevja av leiðsluni í Kringvarpinum, at hon sigur okkum hvør orsøkin var til, at Meinhard Bjartalíð ígjárkvøldið var ein lítlan mánað fyri sína tíð.

# Jesus – offur, jødi ella...?

KRISTIAN HANSEN
Klaksvík,
Cand.Theol.

Nærum hvønn dag koma nýggjar bøkur út, sum royna at geva sítt boð uppá, hvør tann veruligi Jesus var. Áhugin fyri Jesusi hevur helst ongantíð verið størri enn í dag. Tí er talan óivað um ein góðan marknað hjá teimum, ið geva slíkar bøkur út. Og sølan tykist at økjast í mun til, hvussu nógvar skandalir og avdúkingar tær hava um Jesus.

Í Sosialinum 1. september 2008 um- og viðmælir Hans Andrias Sølvará nýggju bókina "Jesus – Jøde, Rebel, Gud?" eftir svian Søren Wibeck. Bókin ger upp við stóran part av evangeliinum, sum annars eru nærum einastu søguligu keldurnar til Jesu lív. Tá keldurnar til Jesu lív soleiðis verða skúgvaðar til viks, er tað bert hugflogið, ið setur mark fyri, hvørjar "veruleikar" granskingin kann leggja fyri dagin. Eg skal her bert taka ein "veruleika" fram úr ummælinum.

Sagt verður, at í tí elsta evangeliinum, Markusevangeliinum, er tann kristni tankin um, at Jesus doyði sum eitt offur fyri heimsins synd, fráverandi. Víst verður til Marcus Borg professara. (Marcus Borg er limur í *Jesus Seminar*. Í *Jesus Seminar* verður hildið uppá, at tann "veruligi" Jesus eigur bert 20% av orðunum og enn og minni av gerningunum, sum evangeliini tilskriva Honum. *Kristeligt Dagblad 24.dec 1999*). Í ummælinum stendur m.a.:

"Tað er bara einastaðni í Markusevangeliinum, at hesin tankin kundi sæð út til at verið til staðar. Tað er í Mk.10:45; har Jesus sigur: "Tí at menniskjusonurin er ikki heldur komin fyri at vera tænaður, men fyri at tæna og at geva lív sítt sum loysigjald fyri mong." Tað grikska orðið "*lutron*" kundi bent á bótoffurtankan, men ger tað heilt sikkurt ikki. Orðið verður í Bíbliuni ikki nýtt í týdninginum loysigjald fyri synd, men í týdninginum: "at seta fríar fangar (ofta krígsfangar) ella trælir (ofta gjaldstrælir)."

V. ø. o finst Kristusar sáttardeyði – sum er kjarnin í kristindóminum – ikki í elsta evangeliinum. Tað er bert nakað, sum tey kristnu skulu hava funnið uppá seinni.

Men hetta má sigast at vera eitt dømi um vánaligt granskingararbeiði. Tí tá loysigjald varð goldið fyri trælir og fangar, var oftast goldið við *peningi*. Jesus tosar hinvegin um at gjalda við *egnum lívi*. Her er tí greitt talan um ein gudfrøðiligan tekst. Lesarin hugsar beinan vegin (1) um kontekstin (Mk.10,32-45), har Jesus tosar um, at hann skal líða deyðan og rísa uppaftur triðja dagin (vv. 33-34 og 45) og síðan (2) um hinar tvær forsøgnirnar um deyða Sín (Mk.8,31 og 9,31).

Syndoffurtankin var kendur í jødadóminum og var als ikki fremmandur fyri lærusveinum Jesusar. Bótoffrið var jú nakað, ið jødarnir dagliga vóru mintir á. At leggja ein politiskan týdning í Jesusar útsøgn er tí at skúgva veruligan kontekst til viks fyri síðan at rangsnúgva tekstin.

Víðari stendur í ummælinum hjá Sølvará: "Tann kristni tankin um, at Jesus doyði fyri heimsins synd finst sambært Marcus Borg ikki hjá Markus."

So er spurningurin um Marcus yvirhøvur hevur lisið Markus. Tí tankin um Jesu bótoffur finst ikki bert í Mk.10,45. Hann er púra greiður í Mk.14,24: Og Hann segði við teir: "Hetta er blóð mítt, blóð sáttmálans, sum verður úthelt fyri mongum."

Allir Jødar kendu týdningin av sáttmálablóðinum. Her er talan um sáttarblóð, ið ger bót fyri synd. Og hetta er aðaltankin í kristna boðskapinum. Hetta er sjónligt í øllum Nýggja Testamenti – eisini hjá Markusi.

Tað tykist, sum um at nøkur eru so íðin at lesa egnar meiningar og "feilir" inn í evangeliini, at tey gloyma at lesa úr evangeliinum.

# Samhugi við íslendingar

JENS WANG



Sum føroyingur vil eg takka løgmanni, Kaj Leo Johannesen fyri, samhugaskrivið, hann vegna Føroya landsstýri sendi íslendska starvsbróðuri sínum, Geir H. Haarde, 8. oktober 2008.

Tað eru ivaleyst nógvir syndabukkar í Íslandi í hesum døgum, og lætt er tað at havast at.

Men Ísland og fólk tess eru í stórari neyð. Helst er neyðin væl størri, enn hana vit upplivdu í Føroyum í nítiárunum.

Tí er at vóna at, vit sum land og fólk eru før fyri at síggja upp um orsøkir og frágreiðingar og heldur í verki vísa veruligan bróðirligan samhuga á allan hugsandi hátt.

Latið okkum sum land og fólk - sum einstaklingar og vinnulív - í verki vísa, at vit standa aftan fyri nevnda samhugaskrivi.

Og til íslendingar í Føroyum vil eg ynskja alt tað besta í vónini um, at tit og fólk tykkara finna ugga og troyst á røttum stað, og sum fólk koma væl fyri tykkum skjótt.

# Minni úr Føroyum

PETRA Í ELIASSTOVU
(ið liggur í Stevns)

Í Sosialinum 11.9.08 læs eg, undir yvirskriftini »Nú skulu føroyingar aftur til Føroyar« at kannað verður, hví teir ikki koma heim aftur. Varð eg spurd, vildi eg sagt: »Landslagið er tað sama, sum tá eg fór heiman í frá fyri 47 árum síðani. Veðurlagið er tað sama, sum tá eg fór, men fólkið er broytt ómetaliga nógv hesi 47 árini, tá eg var 20. Materialisman tók valdið longu seinastu helvt av hálvfjersunum.

Børnini fingu pening ístaðin fyri kærleika frá foreldrum, ommum og abbum. Sosialisman í heiminum viknaði í hvørjum. Tað bleiv til »títt og mítt«. Tá skrivaði eg hesa yrking:

Mangt er at minnast frá barnsbeini av
so vøkur minnir øll somul
frá sólin reis og til hon fór í kav.
Nú eri eg skjótt vorðin gomul.

Tó minnist eg mammu, tí bestu í verð
hon er fyri mær sólin bjarta.
Hon fylgir við mær á mínari ferð
minnini liva í hjarta.

Føðiland Føroyar, eg elski teg høgt
hvønn tind, hvønn stein, hvørja bylgju.
Hvar enn á jørð mín leið veður løgd
minnini altíð mær fylgja.

Land mítt, tú grætur líka sum eg
myrkur yvir klettunum liggur.
Tó skalt tú vita, at eg elski teg
minnini hava vit eftir.

